## Til minnis um Maritu



So verður sagt av monnum
at lívið er markleys neyð
eitt dýpi av gráum døgum
og børn, ið biðja um breyð
Kanska er lívið markleys neyð
Kanska er lívið gott
og kanska eg ein skínandi dag
Beri kenslu av myrkari nátt

(J. P. H.)

Dagurin var ikki skínandi, men myrkur og grátungur eins og tey lagnutungu boðini, sum bórust okkum hin 1. juni – 2 mánaðir eru longur farnir, síðani vit fingu boðini um, at Marita ikki var ímillum okkum longur. Ilt var at fata veruleikan av hesum feigdarboðum og ómetaliga tungt var at koma ígjøgnum teir døpru dagarnar, sum komu í kjalarvørrinum, tí missurin var, og er, so stórur og óveruligur.

Marita var nakað fyri seg og hetta merkti hana og umhvørvi hennara. Hon fór sum ung niður til Danmarkar at útbúgva seg til ljósmóðir og starvaðist á Ríkissjúkrahúsinum í drúgva tíð. Hon ferðaðist eisini víða, búði m.a. eitt skifti í Saudi-Arabia og setti hetta ein dám á hana, sum eisini sást aftur í heimi hennara.

Í 8 ár untist tað okkum at hava Maritu á Landssjúkrahúsinum. Hon var fakliga serstakliga dugnalig og var eisini dugnalig til so mangt annað. Alt, sum hon fekst við, var merkt av nærlagni, dygd og vakurleika. Eisini hon sjálv. Og í svimjihøllini var hon fastur gestur. – Marita var altíð klár við eini hjálpandi hond, tá okkurt serligt var á vási og onki varð hálvgjørt. Hon gav altíð eina fatan av at hava stýr á øllum og tú varnaðist ikki, at hesi kvinnu, sum sá út til at hava alt, sum skal til, eisini tørvaði eina hjálpandi hond, men ikki megnaði at taka ímóti, tí tað fall henni so nógv lættari at geva – og kanska er tað júst hendan ímyndin av Maritu, sum hóvaði henni og okkum best…

Marita fekk ikki nakað barn sjálv, men hon átti familju og vinfólk, sum vóru góð við hana eins og nógv takksom foreldur at teimum børnum, sum hon hjálpti inn í hesa verð, tí hon var sera væl lýdd í yrki sínum.

Saknurin er stórur, og missurin er tungur at bera.

Í djúpari samkenslu við teimum, sum eftir sita, vilja vit við hesum lýsa frið yvir minnið um Maritu.

**Ljósmøðurnar**

# Pan Fish í fríum falli

**Jógvan Hugo Gardar, Oslo**

Virði á Pan Fish hvørvur við eini øgiligari fer á virðisbrævamarknaðinum í Oslo. Fyrrapartin í dag blivu meir enn ein millión Pan-partabrøvum løgd út til sølu. Orsøkin eru partaeigarar, sum eru troyttir av øllum teimum keðiligu tíðindunum, sum eru komin frá felagnum seinastu tíðina.

Orsøkin til at Pan Fish eftir stuttari løtu fyrrapartin minkaði við 35 prosentum í virði, er sambært Intrafish.no tíðindini um, at felagið má út at leita eftir feskum 500 milliónum norskum krónum í heyst.

Eitt Pan Fish partabræv hevði eina løtu fyrrapartin eitt virði uppá 5,90, men fór so nakað upp til 6,15. Miðalvirði á partabrævinum seinastu 12 mánaðarnar hevur verið nærri 50 krónum. So nógv virðir eru burtur.

Oslo Børs steðgaði handlinum við Pan-partabrøvunum um middagsleitið og kannar nú eftir, hví partabrøvini brádliga minkaðu so nógv í virði. Hetta er vanlig at virðisbrævamarknaðurin ger, tá virði á einum partabrævi broytist óvanliga nógv antin upp ella niður.

Henrik Old, løgtingsmaður:

# Vil hava greiðu á siglingini til Vágs

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*



– Kann landsstýrismaðurin syrgja fyri, at lógin um fólka- og farmaflutning verður hildin, og at Smyril kemur at sigla av Vági til Havnar?

Henda spurning hevur Henrik Old, løgtingsmaður, sett Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í Vinnumálum. Henrik Old sigur, at í apríl í 1999 samtykti løgtingið eina broyting í lógini um fólka- og farmaflutning, har sagt verður í grein 2, at »landsstýrið skipar fyri sjóvegis sambandi á hesum leiðum: Vágur-Tórshavn-Tvøroyri-Tórshavn og so framvegis.«

Í seinastu lýstu ferðaætlan broytir Strandferðslan leiðina, sum sigld er úr Tóshavn á Vág og frá Vági til Tórshavn til at verða: Tórshavn-Vág og síðani Vág-Drelnes og so seinni á degnum til Havnar, sigur Henrik Old.

Hann staðfestir, at ferðaætlanin ikki fylgir lógini um fólka- og farmaflutning, og tí verður spurningurin settur landsstýrismanninum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit skyldfólki, vinum
og øllum tykkum, sum sýndu hjálpsemi
og samkenslu, tá kæri sonur og bróður okkara

**Knút Andrassarson á Krossbrekku**
Hvalvík

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum á føðideildini á Landssjúkrahúsinum,
fyri tykkara stóru hjálp og umsorgan.
Tøkk til prestarnar, Bergur D. Joensen
og Jógvan Fríðriksson fyri góð og troystarrík orð.
Fyri stóran kærleika og tolsemi, ið okkum varð víst.
Tøkk til felagið Pinkubarnadeyði.
Tøkk til tykkum øll, sum á so ymiskan hátt
hjálptu so væl til við jarðarferðina.
Tøkk fyri vitjanir, uppringingar og heilsanir.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.
Gud vælsigni tykkum øll.

*Familjunnar vegna*

**Andrass, Guðrið, Jóhanna Maria, Barbara,**
**Petur Ingvard og Dann**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og kenningum at kæra
mamma, omma, langomma og vermamma okkara

**Elsebet Malena Frederikka Rasmussen**
fødd Olsen, ættað úr Svínoy,
vanliga nevnd Espelena

andaðist á Landssjúkrahúsinum
fríggjakvøldið 9. august 2002, 76 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
týsdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

**Sigga, Niclas, Malan, Mona og Finn**

Til ber at stuðla Føroya Felag móti Krabbameini.



Anfinn Kallsberg, løgmaður:

# Málið er avgreitt frá mínari síðu




**– Eg ætli mær ikki at gera meira við hetta málið, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum framvegis heldur seg til skrivligu umberingina, hann fekk frá Tórbjørn Jacobsen á ólavsøku**

STRÍÐ UM LØGMANN
*Eirikur Lindenskov*

– Hetta málið er langt síðani lagt afturum. Eg fekk eina skrivliga umbering frá Tórbjørn Jaocbsen á ólavsøku, og harvið er málið avgreitt.

So avgjørdur er løgmaður framvegis, tá vit biða hann um viðmerking til orrustuna, sum stóðst av, at Tórbjørn Jacobsen legði løgmann og Jørgen Niclasen undir ikki at kenna mun á sínum og annara.

Í blaðnum leygardagin varð nomið við møguleikan hjá løgtinginum at seta eina nevnd, eina sonevnda grein 19 nevnd, sambært stýrisskipanini. Grein n 19 í stýrisskipanini sigur, at »løgtingið kann skipa nevndir av tingmonnum at kanna alment umvarðandi mál. Nevndirnar hava rætt at krevja skrivligar ella munnligar upplýsingar frá einskildum borgarum eins væl og frá almennum embætismonnum.«

– Løgtingið hevur nógvar sanktiónsmøguleikar, um tað heldur, at eg ikki kann verða sitandi sum løgmaður. Men eg haldi, at tað reiðiligasta hevði verið, at teir reistu eitt misálitsuppskot móti mær, sigur Anfinn Kallsberg, sum staðfestir, at tað er onkur, sum vil kóka suppu upp á hetta málið.

Í Degi og Viku fríggjakvøldið varð Sjúrður Rasmussen, løgfrøðingur á Løgtingsskrivstovuni, endurgivin fyri at siga, at málið um løgmann neyvan fellir undir »alment umvarðandi mál«, meðan annar løgfrøðingur segði, at málið um løgman kann liggja innanfyri heimildina við grein 19 nevndini, júst tí, at løgmaður er løgmaður, og harvið kann fortíðin metast sum »alment umvarðandi«.

Aðalstjórnin hjá Tjóðveldisflokkinum viðgjørdi stríðið millum Tórbjørn Jacobsen og løgmann á fundi leygardagin. Høgni Hoydal segði við útvarpið sunnudagin, at hann onga viðmerking hevði til málið, fyrr enn tað eisini var viðgjørt í tingbólkinum.

Fyrr hevur Høgni Hoydal sagt, at málið ikki er eitt flokspolitiskt mál, men eitt persónligt stríð millum Anfinn Kallsberg, løgmann, og Tórbjørn Jacobsen.